# FØROYA KOMMUNUFELAG

FKF jour: 09-141_1.2
dags. 21-02-2011

**Vinnumálaráðið**

vmr vmr.fo

***Viðv.: 11 /00087 Uppskot til løgtingslóg um at banna mismuni á arbeiðsmarknaðinum orsakað av breki***
Felagið hevur móttikið tygara skriv 15-02-2011 og er hettar viðgjørt á stýrisfundi 18-02-2011.

Í mun til Kapittul 3 í uppskotinum, sum handlar um samsýningar og revsing, vil felagið gera vart við, at yvirskriftin “Samsýning, próvdøming o.a.” kann tykjast misvísandi.

Orðið “próvdøming” verður ofta nýtt í samband við próvtøkur á lærustovnum, har próvdómarir, censorar, meta um støði hjá næmingum ella lesandi. Felagið leggur tí upp til, at annað, meira passandi, orð, verður nýtt í staðin fyri “próvdøming”, tí próvdøming í omanfyrinevnda týdningi er talan ikki um í uppskotinum.

Annars hevur felagið ikki viðmerkingar til uppskotið.

fyri felagið

Bergmann Finnsson, ráðgevi.

frammi í Gerði 1 • FO-340 Kvívík • Føroyar
Tel: (+298) 42 18 10 • Fax: (+298) 42 18 11 • kontakt@fkf.fo • www.fkf.fo